**Magnus Heinason - Túrfrágreiðing**
**Yvirlitstrolingar. Túrur nr. 1306.**
**Tíðarskeið: 6/03-13/03 - 2013**

---

**Fólk við frá Havstovuni:** Petur Steingrund, Luis Ridao Cruz, Poul Vestergaard, Mourits Mohr Joensen og Dagunn Clementsen.

**Ábyrgd:** Petur Steingrund.

**Endamál:** Hetta var seinni túrurin av yvirlitstrolingunum á vári í ár. Høvuðsendamálið við túrinum var at fáa til vega tilfar, ið skal nýtast í stovnsmetingunum av toski, hýsu og upsa, t.e. veiða í vekt og í tali, longdarbýti, vektbýti, aldursbýti, kynsbýti og kynsbúning av nevndu sløgum. Umframt skuldi vekt, tal og longdarbýti skrásetast fyri øll fiskasløg, ið vórðu veidd. Eisini skuldu magakanningar gerast av toski, hýsu, upsa.

**Reiðskapur:** 116 fóts kassatrol við 40 mm meskum í posanum. Steinham lemmar. Breitlar 60 og 120 m.

**Um túrin:** Fóru út hósdagin 6/3 kl. 23:45. Byrjaðu at trola vestan fyri Sandoynna. Væl gekst at taka støðir, og flestu støðirnar vestanfyri vóru lidnar sunnudagin. Mánadagin byrjaðu vit eystan fyri Munkagrunnin, og støðirnar á Munkagrunninum vóru lidnar týsdagin. Mikudagin tóku vit tvær støðir vestan fyri Suðuroy, sum vóru tær seinastu á túrinum. Teir fyrstu tveir dagarnar var vindur av landsynningi og eystri, men tað darvaði ikki nakað, tí vit lógu í lívd av Sandoy/Suðuroy, og síðan var veðrið sera gott. Vit landaðu í Havn mikudagin kl. 14.

**Prøvatøka:** Veiðan varð viðgjørd sambært kanningarætlanini og sýnishondbókini. Yvirlit yvir veiðu, nytrur og magar (Talva 1) er víst niðanfyri.

**Nær eru prøvarnir upparbeiddir:** Túrurin var liðugt rættaður 14. mars. Ynskiligt er, at nytrurnar skulu vera lisnar og innlagdar í databasu í seinasta lagi 15. apríl.

**Fyribilsúrslit:** Toskurin stóð meira spjaddur enn vanligt og var at fáa á ymsum støðum, har hann ikki plagar at vera hesa ársins tíð, t.d. á Munkagrunninum. Av tí sama var einki stórt toskahál hendan túrin, sum onkuntíð hevur verið vestan fyri Sandoynna. Eingin nebbasild var í fiskamagunum, men nakrar fáar í trolinum. Ein upsi hevði etið tveir smáar makrelar (17-18 cm langir) vestan fyri Suðuroynna.

Úrslitini fyri allar tær 100 støðirnar (trolhálini) eru víst í Mynd 1 til Mynd 6, har veiða upp á roynd í kg per troltíma er víst fyri úrvald fiskasløg líka síðan yvirlitstrolingarnar byrjaðu í 1983. Eitt sindur meira varð fingið av toski í 2013 enn í 2012, meðan tað sama varð fingið av hýsu (Mynd 1). Tað sama varð fingið av upsa og gulllaksi (Mynd 4), meðan meira varð fingið av longu og reyðsprøku (Mynd 2 og 3). Niðurgongdin í hvítingsbróðri tykist vera steðgað, meðan svartkjaftur økist aftur (Mynd 6).

**Talva 1**. Veiða, nytrur og magar tikin á túri 1306 (seinna helvt av yvirlitstrolingini í mars 2013).

| Fiskaslag | KG | Nytrur | Magar |
|---|---|---|---|
| UPSI | 4098.330 | 318 | 56 |
| TOSKUR | 2732.576 | 239 | 54 |
| HÝSA | 2370.179 | 335 | 79 |
| HVÍTINGSBRÓÐIR | 455.639 | 6 | 4 |
| LONGA | 417.145 | 14 | 6 |
| LÍTLI KONGAFISKUR | 333.698 | | |
| SVARTKJAFTUR | 298.135 | 20 | |
| GULLLAKSUR | 272.527 | | |
| TRANTKONGAFISKUR | 259.465 | | |
| REYÐSPRØKA | 250.376 | | |
| HAVMÚS | 211.563 | | |
| STÓRI KONGAFISKUR | 67.590 | | |
| SANDSPRØKA | 64.822 | | |
| KNURRHANI | 63.292 | | |
| BROSMA | 62.381 | 20 | 7 |
| LÍTLA BROSMA | 61.695 | | |
| HVÍTINGUR | 55.087 | | |
| SKRAMBUL | 44.315 | | |
| BLÁLONGA | 42.695 | | |
| TUNGA | 35.759 | 5 | 5 |
| LOLIGO | 34.622 | | |
| HALAHVASSA SKØTA | 19.450 | | |
| HVASSASPREK | 18.809 | | |
| GLASKVOYSA | 16.940 | | |
| KJAFTSVARTI KONGAFISKUR | 15.751 | | |
| LÁLLA | 11.288 | | |
| ROGNKELSI | 10.391 | | |
| LIRI | 10.310 | | |
| HAVTASKA | 8.424 | | |
| BUKSVARTI HÁVUR | 7.889 | | |
| HVASSHVOYSA | 5.755 | | |
| SILVURMURTUR | 3.739 | | |
| KALVI | 2.605 | | |
| SVARTKALVI | 2.300 | | |
| ROSSAMAKRELUR | 1.710 | | |
| AGNHØGGUSLOKKUR | 1.199 | | |
| GLÝSUFISKUR | 1.003 | | |
| ELEDONE | 0.633 | | |
| KLINGRUSKØTA | 0.505 | | |
| TRØLLAKRABBI | 0.456 | | |
| HUMMARI | 0.064 | | |
| NEBBASILD | 0.026 | | |
| TILSAMANS | 12371.138 | 957 | 211 |




Mynd 1. Veiða upp á roynd (kg per troltíma) hjá Magnusi Heinasyni av toski og hýsu.




Mynd 2. Veiða upp á roynd (kg per troltíma) hjá Magnusi Heinasyni av brosmu og longu.




Mynd 3. Veiða upp á roynd (kg per troltíma) hjá Magnusi Heinasyni av reyðsprøku og tungu.




Mynd 4. Veiða upp á roynd (kg per troltíma) hjá Magnusi Heinasyni av gulllaksi og upsa.




Mynd 5. Veiða upp á roynd (kg per troltíma) hjá Magnusi Heinasyni av stóra kongafiski og trantkongafiski.




Mynd 6. Veiða upp á roynd (kg per troltíma) hjá Magnusi Heinasyni av svartkjafti og hvítingsbróðri.

**Viðmerkingar:** Viðmerkingar (smálutir av ymsum slagi) til túrin eru skrivaðar í Tur1306d.doc.

Petur Steingrund